**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI SJÓSAVNIÐ Á ARGJUM**
SB_Argir_Sjósavnið_2023_X_202X

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta skjali 1, partur av matr. nr. 56as, Kirkjubøur, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa økið til sjósavn, samsvarandi skjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í D3 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

Stk. 3. Sambært kap. IV, § 23, stk. 6 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri D3 øki, at útstykking einans verður loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Stk. 1. Økið verður lagt til sjósavn og tænastuvirki, ið hava samband við hetta.

Stk. 2. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.

Stk. 3. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,5.

Stk. 4. Hæddin skal ikki fara upp um hæddarkurvu 14, sí prinsipp skurð á viðhefta skjali 3.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk,

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Sjósavnið á Argjum | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1.500 | | | | |
| **Dagur** | 14.04.2023 | **Journal** | 18/00853 | **Tekna** | RVH |




## Tórshavnar Kommuna

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt Sjósavnið á Argjum | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 2 | | | | |
| **Mát** | Ikki mátfast | | | | |
| **Dagur** | 14.02.2023 | **Journal** | 18/00853 | **Tekna** | |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Kvíggjartún | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 3 | | | | |
| **Mát** | Ikki mátfast | | | | |
| **Dagur** | 14.04.2023 | **Journal** | 18/00853 | **Tekna** | |